


# í Visjón 2015

helst sjálv finna ein leist, har fyritøkurnar í felag eru við í føroyska granskingarátakinum. Tí eru granskingarumvørvi, sum t.d. hugskotið við granskingarparkini, sum ger tað møguligt at læna hølir og útgerð og samstundis verða í einum granskingarumhvørvi, uttan at skula gera íløgur í granskingarútgerð. Hetta ein loysn sum fyri føroyska samfelagið sær skilagóð út.

**Úrslit av miðvísum arbeiði**

Júst støðan, at tað við miðvísum arbeiði sær út til at bera til at gerast partur av granskingar- og útbúgvingarsamstarvinum hjá ES, sum rættiliga nógv ikki ES lond eru partur í, vísir alheimsgerðina og møguleikarnar. Tað fæst neyvan meiriluti fyri einum ES limaskapi beint nú, men stórur áhugi er fyri at samstarva við hendan partin av kervinum. Eins og loftferðslupakkin, sum Føroyar gerast partur av, eru hetta dømir um hvussu alheimsgerðin eisini kann verða, nevniliga samstarv á ávísum málsøkjum.Tað hevur leingi verið eitt ynski at sleppa uppí hetta samstarv, og nú sær út til at stórur møguleiki er fyri, at tað fer at eydnast. Men her skulu vit eisini virðismeta týdningin av at hava eina sendistovu á staðnum og at ráðharrar eru við í tilgondini, sum ferðin hjá Løgmanni í apríl til Brússel var og nú hjá Jógvan á lakjuni. Hetta gav politiska tyngd á uttanríkisøkinum og setur aftur fram spurningin um Føroyar eiga at hava ein uttanríkisráðharra.

**Grundarsteinar eru**

Nú eru grundarsteinar at byggja á. Vit hava uppskot um granskarapark um umskipan av granskingarskipani, soleiðis at eitt veruligt granskingarumhvørvi her sær dagsins ljós, og so vónandi at vit gerast partur av ES pakkanum. Nú mangla politisku langtíðasemjurnar millum politisku flokkarnar. Tað liggur á flokkunum at gera ein leist, sum ikki verður sleptur, tí at samgongan broytist, og ein leist sum hevur stuðul frá vinnuni og granskingarumhvørvinum. Tilgongdin, sum nú er neyðug, er felagsstev, har neyðsemjur eru ein partur av spælinum.

Júst hesin parturin hevur havt rættiliga høga raðfesting í fyrireikingararbeiðnum hjá Landsstýrinum við Visjón 2015. Tað er lítil ivi um, at politiskur stuðul er til samstarvið við ES. Men tað er ikki nóg mikið, viljin skal eisini vísast í verki.

